# Ein heilsan til Evald Rasmussen

## á 50 ára degnum 27. des. 2006



Triðja jóladag bleiv Evald 50 ár og vilja vit ynskja honum hjartaliga tillukku við degnum.

Evald er ættaður úr Øravík, men nú búðsitandi í Hoyvík, hann er giftur við Jean ið er hálvur føroyingur og hálv fraklendingur, og saman eiga tey børnini Vanju og Høgna.

Nú nógv verður skrivað um ítrótt, og ársins ítróttarfólk, so kunnu vit ikki lata vera við at nevna at Evald, sjálvt um hann er náddur 50 ár, framvegis er „still going strong".

Fyri nøkrum árum síðani var hann á Oyggjaleikunum í triathlon, hevur tvær ferðir súkkla Sjælland runt, verið í Fredericia í triathlon, svomið 5 ferðir um Nólsoyarfjørð har hann hevur vunnið nakrar ferðir, um Tvøroyrarfjørð, og nógvar aðrar kappingar.

Alt hetta bert innan fyri tey síðstu 10 árini, tí kappingarsúkklu keypti hann sær ikki fyri enn hann fylti 40 ár, so tað kann sigast at tað ongantíð er ov seint at byrja at íðka ítrótt.

Enn einaferð hjartaliga tillukku, og vónandi heldur tú fram nógv ár framyvir.

**Heilsan nakrir vinir**

# Niels Nattestad leggur frá sær

**Eftir tíggju ár í stjórasessinum gevst Niels Juul Nattestad nú sum stjóri í Venjingarskúlanum**

ARBEIÐSLÍV
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

31. mars verður seinasti dagur hjá Niels Juul Nattestad sum skúlastjóri í Venjingarskúlanum. Seinastu tíggju árini hevur hann virkað sum stjóri í einum av landsins størstu skúlum.

– Tá eg fór í starv sum skúlastjóri avgjørdi eg, at eg skuldi taka tíggju ár í sessinum, og tað er nú ein avgerð sum nú verður førd út í lívið, sigur Niels Juul Nattestad.

Áðrenn Niels Juul Nattestad tók við stjórasessinum var hann varaskúlastjóri í 16 ár. Hann hevur sostatt staðið á odda fyri Venjingarskúlanum í ein mansaldur, men 1. apríl verður tað onkur annar enn Niels Juul Nattestad, sum verður stjóri.

Niels Juul Nattestad, ella "Natte" sum hann oftast verður róptur, verður tá 61 ára gamal. Hann hevur enn ikki avgjørt, hvat hann fer at takast við, tá hann gevst sum stjóri, men vissar tó fyri, at hann ikki kemur at keða seg.



†

## Andlát og jarðarferðir

**Dávur Jóhan Niclassen** fer til gravar úr Sørvágs kirkju mikudagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Dávur Jóhan, kunnu lata eina peningagávu; konta í Eik.

Kistan við **Mainhard Danielsen, Nes, vanliga nevndur Mainhard uppi í Forna**, fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum í dag kl. 17 heim í Fríðrikskirkjuna. Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni mikudagin 10. januar klokkan 13.
Halldis Eade (Id), fødd Jensen, ættað úr Leynum, búsitandi í Liss í Onglandi, andaðist í heiminum 5. januar, 62 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá kæri maður, pápi,verpápi, abbi og langabbi okkara

**Thorbjørn Hermansen**
Tvøroyri

andaðist og varð jarðaður.
Takk til Jónsvein Bech, prest, organist, klokkara, sangarar og berarar.
Takk fyri blómur, kransar, uppringingar og gávu til Tvøroyrar kirkju og til øll, ið fylgdu honum til hansara síðsta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Oddvør, Herjálvur, Sunneva og Finnbjørn**

**Dagurin**

**10. januar. Páll einabúgvi**, deyður ár 341. Livdi eini 90 ár í egyptisku oyðimørkini og gjørdist 113 ára gamal. Sigst at hava verið fyrsti kristni einbúgvi og skírdur halgimenni. Navnið Páll er komið av latínskum Paulus (tann lítli)


Tín stóri dagur
Takka í Sosialinum